Føroya Landsstýri

**Fiskimálaráðið**
**SKIPAEFTIRLITIÐ**

## Fulltrúi/málsviðgeri

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum fulltrúa/málsviðgera til setan skjótast gjørligt.

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, og arbeiðsstaðurin er Miðvágur.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
1 málsviðgerð innan sjóvinnulóggávu
2 útgávu av sjóvinnubrøvum, siglingarbókum og samleikaprógvum
3 átekna heilsuprógv, viðgera undantaksloyvir til mynstringar v.m.
4 vanligt skrivstovuarbeiði
5 telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**

**Til starvið krevst:**
6 viðkomandi útbúgving
7 góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
8 telduførleika á brúkarastøði
9 góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
10 góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Skipaeftirlitinum/Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2003 kl. 12.00

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið, Box 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra ella tlf. 353030 og tosa við Johild Ziskason, fulltrúa.



# BILSKROKK
*Lakkering & Plátuverkstaður*

Vit taka okkum av øllum skaðum sum t.d. tryggingarskaðum, buglum, lakering, rusti og mongum øðrum.

TLF. 32 24 71 - 21 24 71
Slættanesgøta 9 - Boks 2227 - Fo-110 Tórshavn


<ph_1>


*Bústevnan*

# HÚS & INNBÚGV

*Í ítróttarhøllini í Runavík*

*4. – 6. apríl 2003*

Entreprenørar • Arkitektar og teknistovur • Peningastovnar
Tryggingarfyritøkur • Byggimeistarar • Timburhandlar
Sniðhúsaframleiðarar • Snikkaravirki og vindeygaframleiðarar
VHS - innleggarar • EL - installatørar • Málarar • Múrarar
**Handilsfyritøkur:** VHS, EL, Køkar, Baðirúm, Hvítvørur, Møblar og innbúgv

HÚS & INNBÚGV
Postboks 84 • FO-620 Runavík
Tel 44 99 49 • Fax 44 98 48
Fartel 21 19 49
heimasíða: www.bustevnan.fo
e-mail: info@bustevnan.fo




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3525
**Navn:** Sp/f E. M. Asfalt
**Adressa:** 660 Søldarfjørður
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 18.03.2003
**Viðtøkudato:** 18.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Edvard Højgaard Mikkelsen, 660 Søldarfjørður.
**Stjórn:** Edvard højgaard Mikkelsen, 660 Søldarfjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 18.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at hava handil, ídnað, entreprenørvirksemi, asfaltering og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 27. mars 2003*

*Kristin Balle*


HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo




# Til fótbóltsdyst í Danmark

**Á 15 ára føðingardegnum lat Atlantsflog trimum javnaldrum hvør sítt vikuskifti í Danmark við atgongumerki til fótbóltsdystin millum Brøndby og FCK**

FØÐINGARDAGUR
*Edvard Joensen*



*Mike Viderø og Trygvi Askham vóru fegnir, tá teir við tyrlu komu vestur í Vágar í føðingardag hjá Atlantsflogi og sær sjálvum. Triðja javnaldranum, Henry á Fríðriksmørk Borðoy, barst frá*
*Mynd: Edvard Joensen*

Flogvøllurin:
At vera føddur sama dag, sum Atlantsflog fór á flog, hevði á 15 ára degnum við sær at tríggir ungir menn hvør fingu eina vikuskiftisferð fyri tvey við fótbóltsdysti í føðingardagsgávu frá Atlantsflogi.

Teir tríggir, Trygvi Askham og Mike Viderø úr Havn og Henry á Fríðriksmørk Borðoy á Strondum eru javngamlir við flogfelagið, og tað vildi felagið so eisini lata teir merkja.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi lat væl at, tá hann alemnt legði roknskapin fram á tíðindafundi á skrivstovu felagsins í Vágum.

Hetta er fyrstu ferð, aðalfundurin veðrur hildin í Vágum, vísti hann á, og tað er beinleiðis orsakað av Vágatunlinum, segði hann.

Magni Arge boðaði frá munandi fleiri fráfeðrum úr Vagum í summar, enn undanfarna tíð. Tá flogið verður av tí mesta í summar, verður farið 16 ferðir um vikuna úr Vágum, segði hann.

Eisini segði hann frá, at í næstu viku fer Atlantsflog at selja 500 feðaseðlar á rutunetinum uttan fyri Danmarkarrutuna fyri 895,- kr. umframt avgjøld. Teir skulu brúkast í summar.

Danmarkarrutan er nógv størsta inntkukeldan hjá Atlantsflogi. 69% av inntøkunum komu haðani, segði stjórin á tíðindafundinum.


## Bilur til sølu



Nissan Primera 2.0i SE. Árg. 98 koyrdur 58.000 km. Bilurin hevur aric., el rútar, leðursetur. 2 sett av felgum fylgja við.

Prísuppskot 130.000 kr.

**Tlf. 332006/210568**



mazda 6



Prísir úr 198.700,-

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35



FERÐAFRAMSÝNING



*Ung í Føroyum,* 2003

**Myndir , tekningar v.m. frá tiltakinum verða at síggja í Føroya Banka**

Føroya Banki hevur stuðlað tiltakinum UNG Í FØROYUM 2003, og sum liður í hesum hevur verið skipað fyri ferðandi framsýning í deildum bankans.

Henda framsýning endar á deildini á

**Tvøroyri 1. - 3. apríl**

Opið er frá týsdegi kl. 9.30 til og við hósdag kl. 18.00.

kontoIN